# ...ri framleiðslu



*Virkið hjá Føroya Fiskavirking í Havn fær nú vatn úr goymsluni í Villingardali, og vatnið haðani er næstan 100%, sigur Guðrið Andorsdóttir*

skal, verða hesar vegleiðandi kanningar gjørdar einaferð um mánaðin. Vísa okkara kanningar, at bakteriur eru í vatninum, verða vatnroyndir sendar til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, sum neyvari staðfestir, hvussu støðan er.

Guðrið sigur, at tá ið bakteriur eru í vatninum, seta virkini klor til vatnið, sum verður nýtt í framleiðsluni, og tað er eisini Heilsufrøðiliga Starvsstovan sum ásetir markið fyri, hvussu nógv klor virkini kunnu nýta í framleiðsluni.

- So skjótt, vit staðfesta, at vatndygdin ikki er nøktandi, verða tiltøk sett í verk, leggur hon dent á.

### Ongar reklamatiónir

Spurd, um bakteriurnar í vatninum úr Havnardali vóru so nógvar, at trupulleikar kundu verið at hildið seg innanfyri loyvdu klornøgdina, heldur hon, at hetta saktans kundi blivið so, um virkið ikki fekk vatn úr goymsluni í Villingardali.

Vit spurdu eisini Guðrið, um Faroe Seafood hevur fingið reklamatiónir frá viðskiftafólki í sambandi við vánaligu dygdina á vatninum úr Havnardali.

- Nei, vit hava ikki havt hesar trupulleikar, síðan virkið hjá felagnum í Miðvági stóð fyri skotum, tí vatnið, sum hevði verið nýtt í framleiðsluni, var ov nógv fongt við bakterium.

### Krevur nógv

Guðrið leggur dent á, at tað hevur stóran týdning fyri framleiðsluna av matvørum, at vatnið er nøktandi, tí tað krevur ikki so lítið av virkisleiðsluni, tá ið vatnið skal klorast fyri bakteriur.

- Á fundinum við Tórshavnar kommunu fingu vit at vita, at býráðið hevur raðfest vatngoymsluna í Havnardali soleiðis, at nýggj reinsiskipan verður sett upp í sambandi við verkið í seinasta lagi í 2008. Vit skiltu á fundinum, at íløgan, sum skal gerast, liggur um 30 miljónir krónur, sigur góðskustýringsleiðarin hjá Faroe Seafood, Guðrið Andorsdóttir.

# ...Miðvági

Jason Johannesen sigur, at hóast vatnið er reint, nýta tey kortini altíð nakað av klori í framleiðsluni.

- Hetta er fyri at tryggja, at ongar bateriur eru í framleiðsluni, sigur hann.




*- Vit brúka nógv vatn, men vit gjalda eisini fyri tað. Nú vit einki vatn høvdu í morgun, er neyvan nakar, sum endurrindar okkum fyri tapið, segði virkisleiðarin á Fiskavirking í Miðvági, Jason Johannesen, týsmorgunin*

# Færri landingar hjá Beta í Saltangará

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hava færri landingar verið á landingarmiðstøðini hjá P/F Beta í Saltangará enn áður.

Ragnar Olsen, reiðari, vísir á, at skipini, sum regluliga hava lagt veiðina upp í Saltangará, eru vorðin færri í tali, men ætlanin er á ongan hátt at gevast at landa skip.

- Skip eru seld, og onnur hava ligið vegna onkur brek. Hetta hevur ávirkað landingarnar, sigur hann.

Ragnar sigur, at ætlanin tó ikki er at gevast at veita skipum hesa tænastu.

- Vit fara hinvegin at gera uppaftur meira fyri at fáa skip landa hjá okkum, sigur reiðarin.

Ragnar Olsen vísir á, at tveir av gomlu kubabátunum, sum annars eru seldir norskum áhugamálum, eru lagdir, og somuleiðis er Smaragd seldur. Seinasta parið av gomlu kuba-bátunum er enn í vinnu, og teir gera – sum skilst – ein túr í senn.

- Hetta hevur ávirkað talið av landingum, sigur reiðarin.




# Bakur og Stelkur fáa nógvan upsa

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Upsafiskiskapurin var eitt sindur slakari í juli, enn hann annars hevur verið, men nú er líkt til, at nógvur upsi aftur er at fáa.

Bakur og Stelkur landaðu stívliga 300.000 pund av upsa í Saltangará leygardagin, og longu í dag koma skipini innaftur at landa, helst við somu nøgd sum leygardagin.

Ragnar Olsen, reiðari, sigur, at upsin, sum skipini hava fingið, hevur verið á eini leið.

- Bakur og Stelkur hava riggað ógvuliga væl, síðan tey komu til landið, og tey hava fingið nógvan fisk, sigur reiðarin hjá P/F Beta.